## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
1. deild kvinnur

| Dagur | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 25.01 | 14.30 | Neistin-Stjørnan | Hannis & Uni |
| 25.01 | 14.30 | VÍF-Kyndil | Kristian & Sámal |
| 25.01 | 15.00 | VB-Søljan | Birgir & Kári |

1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 25.01 | 16.00 | Neistin-H71 | Hannis & Uni |
| 25.01 | 16.00 | KÍF-StÍF | Trygvi & Kári |
| 25.01 | 16.00 | VÍF-Kyndil | Kristian & Sámal |

**Flogbóltur**
Meistaradeild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.01 | 20.00 | ÍF-Dráttur | Fleyr |
| 25.01 | 14.00 | Mjølnir-KÍF | ÍF |
| 25.01 | 14.00 | Fleyr-TB | ÍF |

Meistaradeild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 25.01 | 16.00 | Mjølnir-Fram | Fleyr |
| 25.01 | 16.00 | ÍF-SÍ | Fleyr |

## ~~Hondbóltsstøður~~

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 2 | 2 - 0 - 0 | 356 | 273 | 83 | 15 |
| 2 | VB | 2 | 2 - 0 - 0 | 371 | 279 | 92 | 12 |
| 3 | Neistin | 1 | 1 - 0 - 0 | 340 | 289 | 51 | 10 |
| 4 | VÍF | 2 | 0 - 0 - 2 | 353 | 308 | 45 | 9 |
| 5 | StÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 296 | 343 | -47 | 5 |
| 6 | Søljan | 1 | 0 - 0 - 1 | 238 | 319 | -81 | 2 |
| 7 | Kyndil | 1 | 0 - 0 - 1 | 210 | 353 | -143 | 1 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 0 | 0 - 0 - 0 | 300 | 270 | 30 | 9 |
| 2 | StÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 245 | 232 | 13 | 7 |
| 3 | VÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 266 | 244 | 22 | 6 |
| 4 | Neistin | 0 | 0 - 0 - 0 | 278 | 259 | 19 | 6 |
| 5 | KÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 244 | 291 | -47 | 3 |
| 6 | H71 | 0 | 0 - 0 - 0 | 233 | 270 | -37 | 2 |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 11 | 9 - 2 | 30 | 9 | 21 | 10 |
| 2 | Mjølnir | 11 | 8 - 3 | 27 | 12 | 15 | 8 |
| 3 | Dráttur | 11 | 5 - 6 | 21 | 21 | 0 | 6 |
| 4 | ÍF | 11 | 5 - 6 | 16 | 19 | -3 | 6 |
| 5 | KÍF | 11 | 5 - 6 | 17 | 25 | -8 | 5 |
| 6 | Fleyr | 11 | 1 -10 | 7 | 32 | -25 | 1 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 9 | 8 - 1 | 24 | 5 | 19 | 9 |
| 2 | Mjølnir | 8 | 7 - 1 | 21 | 4 | 17 | 7 |
| 3 | SÍ | 9 | 5 - 4 | 17 | 14 | 3 | 6 |
| 4 | Fram | 9 | 2 - 7 | 8 | 22 | -14 | 2 |
| 5 | Fleyr | 9 | 0 - 9 | 2 | 27 | -25 | 0 |

# Næsta slagið hjá Stjørnuni

**Eftir sigurin á VÍF seinasta vikuskiftið, skal Stjørnan hesa ferð royna seg á útivølli móti Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Skal Neistin veruliga hanga fast í oddastríðnum, so er helst neyðugt við sigri á Stjørnuni, og ein slíkur vildi av álvara blást gullstríðið víðopið*

Tað var vorðið sum byrjan upp á endaspælið, sum varð Stjørnuni til lut í ár. Eftir eina hálvgum bleyta byrjan við útidysti móti StÍF, sigur kalendarin VÍF, Neistin og VB, og hetta eru júst tey liðini, sum Stjørnan skal kappast við, um dreymurin um FM-gullið skal gerast veruleiki.

Fyrsta royndin gekk væl, tá VÍF varð sent heim við ongum, og nú er tað so Neistin, sum stendur fyri tørni. Undan hesum er støðan hjá Stjørnuni at kalla júst hin sama, sum var undan VÍF-dystinum, tí á stigatalvuni er Neistin fimm stig aftan fyri Stjørnuna, men við einum dysti færri.

Tí kann Stjørnan við enn einum sigri gera gullið til ein spurning millum Klaksvík og Vág, og einki er at ivast í, at tað er júst hesum, sum farið verður eftir sunnudagin. Tað er tó eingin loyna, at bláu kvinnurnar hava eitt óvanligt treiskni í sær, og hetta hevur ofta gjørt, at tær roynast væl betri, enn tað annars varð roknað við. Nakað sum hini liðini longu hava sannað, tí fyri tað nógva av grundspælinum var líkt til, at Neistin ikki skuldi gera tær heilt stóru skreytirnar, men tær hingu alla tíðina í, og enn standa tær ikki so nógv verri í tí, enn hini liðini í oddinum gera. Og fáa tær ein sigur sunnudagin, fer at síggja heilt spennandi út.

### Væntandi heimasigrar

Hinir báðir dystirnir sunnudagin tykjast ikki á sama hátt vera heilt so spennandi.

Í Vestmanna fær VÍF vitjan av Kyndli, og tað er einki at ivast í, at heimaliðið her roknar við tveimum tryggum stigum. Sum støðan er nú, so skal VÍF helst ikki gera sær tær heilt stóru vónirnar um gullið, men nøkur óvæntað úrslit kunnu skjótt broyta hesa støðuna, og so ræður um hjá VÍF ikki at snáva, og tað gera tær neyvan móti Kyndli.

VB skal á heimavølli taka ímóti Søljuni, og somuleiðis er her væntandi, at stigni verða eftir hjá heimaliðnum. Søljan hevur kanska havt eina støðuga leikligu framgongd hetta kappingarárið, men enn skulu tær helst ikki gera sær vónir um stig móti teimum sterku liðunum, og hesi telist VB so heilt avgjørt ímillum.

# Oddurin kann leypa

**Fyri tað nógva hevur gullstríði hjá monnunum líkst eini uppgerð millum ÍF og Mjølnir, men nú hevur SÍ gyltan møguleika at broyta tvídystin til ein trídyst**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Skulu sørvingar gera seg galdandi í ár, so krevur tað, at teir megna at gera nakað við ÍF í dystinum á Kambsdali*

Hjá kvinnunum tykist størsti spenningurin undan vikuskiftinum vera um, hvørt tað verða ÍF ella Dráttur, sum fara at elta tey bæði oddaliðini úr TB og Mjølni.

Dráttur vann Mjølnir kappingina fyri tveimum vikum síðani, og tí mugu tær helst metast sum favorittar, tá tær vitja á Kambsdali, men tað er tó einki at ivast í, at tær hjá ÍF fara at gera sítt til, at talan á ongan hátt verður um nakra lætta uppgávu hjá Drátti.

Bæði liðini hava í løtuni seks stig, sum eru tvey færri enn Mjølnir, og tí vil ein sigur viðføra, at tað enn er samband upp til oddastríðið, har TB tó fekk sær fyrimun við sigrinum á Mjølni seinasta vikuskifti.

Og tað er lítið, sum bendir á, at TB skal missa hendan fyrimunin hetta vikuskiftið. Mótstøðuliði er Fleyr, og sjálvt um dysturin er í Havn, so skal tað vera løgið, um talan verður um nakað annað enn ein tryggan 3-0 sigur til TB.

Mjølnir skal hesaferð á heimavølli royna seg móti KÍF, og her er favoritt-leiklutarin eins greiður. KÍF fer í verandi útgávu neyvan at hótta garvaðu Mjølnir-kvinnurnar, sum uttan iva ætla sær at leggja nógv fyri komandi mánaðirnar í royndunum at vinna TB aftur.

### SÍ á Kambsdali

Hjá monnunum verður spenningurin á Kambsdali, har ÍF tekur ímóti SÍ. Sørvingarnir hava aftur í ár roynt at toyggja seg upp móti tindunum, og tó at hetta ikki er eydnast heilt enn, so er liðið ikki heilt afturúrsiglt.

Bara trý stig eru upp til ÍF á fremsta sessinum, og tí kann ein sigur her gera, at støðan í oddinum gerst heilt spent. Og fyri sørvingar man tað eisini vera ein eyka motivatión, at tað júst var í hesum dystinum, at teir í grundspælinum kendu seg væl og virðiliga snýttar av dómarunum til dystin. Tann umberingin heldur neyvan tvær ferðir á rað, so tað er nú, at SÍ skal prógva, at teir veruliga kunnu gera seg galdandi.

Hin dysturin í mansdeildini verður í Klaksvík, har Fleyr kemur á vitjan. Fyri nøkrum árum síðani – og tey eru nógv eftirhondini – var hetta ein av heilt stóru dystunum í FM-kappingini, men Fleyr er ikki longur tað, sum teir hava verið, og tí er einki at ivast í, at talan verður um eitt slag av avgreiðsluspurningi hjá heimaliðnum, sum í tilsvarandi dystinum í grundspælinum nýtti høvið til at geva fleiri av ungu og óroyndu leikarunum nakað av spælitíð.







**Lakkering & Plátuverkstaður**

Vit hjálpa fólki við bilskaðum/ tryggingarskaðum, lakkering, buglum, rusti og mangt annað.

Ring til okkum og fá eitt gott tilboð.

**- Tlf. 32 24 71 -**

Slættanesgøta 9 - boks 2227 - Fo-110 Tórshavn

**Nýggj Generatoreind til sølu:**



Effektin: 170 kVA 150 kW
Spenningur: 3 x 400 V
Frekvensur: 50 Hz
Motorur: SISU Diesel, typa 634 DSBIMG
Generatorur: Stamford, typa UCM 274 H2

Generatorurin stendur í sýnisglugganum í goymsluni á Skipasmiðjuni og áhugaði kunnu venda sær hagar ella á tlf. 31 11 55

TÓRSHAVNAR SKIPASMIÐJA
www.faroeyard.fo

*Tórshavnar Skipasmiðja er móðirfelag hjá samtakinum ið umfatar skipasmiðjurnar í Havn, á Skála , í Vestmanna og mekaniskan verkstað í Runavík.
Á skipasmiðjuni í Havn arbeiða um 170 fólk.*

Stephanssons Hús



ET EFTERSKOLEOPHOLD I DANMARK?

HORNE UNGDOMSSKOLE TILBYDER:
9. KL. - 10. kl. - 11. kl.

FÅ FORBEDRET DINE DANSKKUNDSKABER

MULIGHED FOR KONTAKT MED FÆRINGER I LOKALOMRÅDET

VENNER FOR LIVET

KONTAKT OS FOR YDERLIGERE INFORMATION

TLF.: 00 45 98 94 93 22
E-MAIL: info@horne.dk
HJEMMESIDE: www.horne.dk

Peter Qvortrup Geisling frá "Lægens Bord" verður í
**Norðurlandahúsinum leygardagin 31. januar kl. 15.00
og á Hotel Norð sunnudagin 1. februar kl. 19.00.**
Atgongumerkir til Norðurlandahúsið kunnu keypast í Norðurlandahúsinum og á Kunningarstovuni.
Atgongumerkini til Hotel Norð kunnu keypast á Statoilstøðini í Klaksvík.



Sosialurin 341800

SPURNINGAR TIL "LÆGENS BORD"

**Hava tygum onkran áhugaverdan spurning um heilsu- og heilsurøkt, - ella um okkurt heilt annað, ið tygum ynskja at seta sjónvarpslæknanum frá Lægens Bord, so kunnu tygum senda hann til IRIS.
Teir mest spennandi og áhugaverdu spurningarnir, verða svaraðir á fyrilestrunum.**

IRIS
Postsmoga 240 · FO-700 Klaksvík
Tel 456390 og 216390 · Fax 456391
teldupostur: iris@iris.fo
heimasíða: www.iris.fo

www.sosialurin.fo